## DAGSINS MEINING

# Fiskivinnan er fuglurin í hondini

Tað gongur næstan ikki dagur, uttan at onkur er í fjølmiðlunum, og fortelur, at vit kunnu ikki dúva uppá fiskivinnuna, og at vit mugu gera okkurt annað. Hetta kemur frá serfrøðingum innan búskap og vinnulívsfólki, og verður hetta sjálvandi sagt í bestu meining. Trupulleikin er bara, at tað er ógvuliga trupult at fáa at vita, hvat "okkurt annað" skal verða. Tosað verður um KT, biotøkni og annað í leysligum vendingum, men millum lítið og einki ítøkiligt. Tað er ikki at taka munnin ov fullan, at kalla hetta "okkurt annað" fyri fuglarnir á takinum.

Orðatakið sigur, heldur ein fugl í hondini enn tíggju á takinum. Tað er eingin skaði í, at hugsa um framtíð og nýggjar vinnur, men vit mugu ansa eftir at fuglurin í hondini ikki verður mistur, meðan vit hyggja at fuglunum á takinum. Fiskivinnan er nógv størsta útflutningsvinna, vit hava, og eigur tí at verða viðgjørd í tí álvara, ið hon hevur uppiborið.

Kjakið í dag er á tveimum planum. Tað fyrra planið er, har alt verður sæð í froskaperspektivi og har fiski-vinnan veður prioriterað lægri enn, um rundstykkir skulu kunna keypast í kirkjutíð ella ikki. Sjónarringurin í hesum kjaki er stuttur, og veiðumannalyndið ger stundum, at perspektivið ikki verður longri enn hvar vinningurin er størst í løtuni.

Hitt seinna planið av kjakinum er tað beint øvugta. Tað er á einum teoretiskum plani, har serfrøðingar úttala seg um, at man skal gera "okkurt annað" í Føroyum, uttan at relatera tað til, hvussu veruleikin sær út. Tá kjakað verður á hesum planinum, so verður jørðkontaktin mangan slept, og man ráðgevur ikki eftir veruleikanum, men soleiðis, sum man heldur at veruleikin teoretiskt sær út. Hesin teoretiski veruleiki er ein veruleiki, har fólk ikki flyta til Danmarkar, tá tey gerast arbeiðsleys, tey fara bara at gera "okkurt annað". Hesin veruleiki er ein veruleiki, har privatir bankar ikki fara á heysin 3 ferð í søgu síni. Hesin veruleiki er ein veruleiki, har marknaðurin tryggjar optimala framleiðslu, og at vinnan fer at gera "okkurt annað" av sær sjálvum, bara landið heldur fingrarnar vekk. Hví hetta "okkurt annað" skal gerast í Føroyum, og um tað tryggjar livilíkindi hjá hvørjum einasta føroyingi, verður ikki kjakast um á hesum plani.

Vit mangla eitt kjak um fiskivinnuna á einum plani ímillum froskaperpektiv og tí planinum, har høvdini eru ov langt uppi í skýggjunum til at síggja veruleikan. Vit mugu kombinera serfrøðina við tí pragmatisku vitanini, ið finst í fiskivinnuni, og koma veiðumannalyndinum í fiskivinnuni til lívs. Trupulleikin í dag er, at so leingi tað bara verður tosað úr kjallarnum og úr skýggjunum, so kemur man ongan veg. Kemur tann dagur, har vit hava meir enn eina útflutningsvinnu av týdningi, so er tað frálíkt, men lat okkum ikki missa fuglin í hondini, meðan vit royna at finna aðrar livivegir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking

**Napolion Magnussen**
*borgarstj.*
*Miðvágur*

Ringdi inn til Fimmarin mikudagin tá ið tann nýggja læknavaktarskipanin var uppi at venda, men eg slapp ikki framat. So her koma nakara av mínum viðmerkingum.

Fyrsta skal sigast at tað er gott at Andor Ellefsen og co. ikki skula samráðast á arbeiðsmarknaðinum, ikki so frægt sum semju innanhýsis hava teir duga at funnið.

Vit uttan fyri Havnina koma at fáa tað nógv verri við hesi skipan, vit koma ongantíð at síggja handan ”rullandi” læknan, hann kemur at sirkulera runt í Havnini, kanska hendingaferð til Kollafjarðar, men so ikki longur. Vit skula sostatt koyra á Landssjúkrhúsið hvørja ferð tað gerst neyðugt tí hann (tann ”rullandi”) ikki kann náa útum miðstaðarøki. Tað verður pá bekostning av okkara trygd atf Havnin skal fáa eina betri skipan.

Eysturoyggin hevur eina nøktandi skipan sum er, ið deilvíst kann kombinerast við Klaksvíkina tá Norðoyatunnilin er komin. Men taka vit so Vágarnar og vestursíðina á Streymoynni kundi tað veri ein fín skipan við teimum 4 læknunum. Koma vit inná tilbúgvingarætlanina fyri Vágarnar, flogvøllin og Vágtunniln er hetta eisin eitt stórt afturstig. Við eini skipan fyri Vesturøki hevði ein lækni veri á Vágoynni helvtina av tíðini og hina helvtina í Norðurstreymoy.

At læknar ikki vilja søkja starv í Havnini er ikki bara orsaka av hesi skipan, her eru anna blanda uppí, eitt nú at tað ikki eru nøktandi hølir í Havnini. Gerið eina skipan fyri Havnina kombinera við Landsjúkrahúsið ella seti teir læknar ið skula til at nøkta øki, so er tað loyst.

Vit føla okkum ótrygg her vesturi og er hetta eitt tíðilig ábending um meiri miðsavnan kring Havnina, ið gerð tað uppaftur verri at fáa fólk at seta búgv og støðast her í útjagaranum.

Tað verður tí ikki uttan svørðslag at vit lata okkum hetta linda. Trúgvi heldur ikki at landstýrismaðurin fær uppbakning fyri hesum, hvørki í sínum nærumhvørvi í norðstreymoy, ella millum tingmenn.

Vit skula eisini liva uttan fyri miðstaðarøki, og ikki doyggja, sjúk í ein bili ávegis suður til Havnar á náttartíð!

# Nú er ovboðið!

**Egon Øregaard**
*skúlastjóri á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.*



Eg eri alt annað enn nøgdur við politisku handfaringina av føroyska skúlaverkinum. Hugsað verður í hesari atløgu um miðnáms- og vinnuskúlarnar.

Staðfestast má, at í Føroyum tykist, sum ongin skipaður skúlapolitikkur er. Ei heldur tykist, at tað finnst nøkur skipað ætlan um skúlabyggingar.

Dømini eru mong. Eitt av teimum, sum er "aktuelt" í løtuni, er m.a. Miðnámsskúlin í Vági.

Eg fari als ikki at leggja meg út í kjakið um miðnámsskúlan í Vági.

Men tað undrar ikki sørt, at tað, sum tykist alt-avgerandi í hesum málinum, er valið millum "miðnámsskúla" ella "ellisheim", og hvat av teimum gevur flest arbeiðspláss — spyrjast kann, er hetta skúla-politikkur?

Tað er eingin loyna, at Tekniski Skúlin í Tórshavn, gjøgnum tey nógvu seinastu árini, hevur verið lítið mettur av føroyskum politikarum. - Sjón gongur fyri søgn. Men at tað stóð so illa til, bæði harmar og vekur upp vreiði.

Seinasta skotið á stammuni, er tá Føroya Løgmaður í Útvarpi Føroya, mánakvøldið 25. apríl sigur, (citat) *"…. at man fær møguleika fyri at útbyggja skúlan (skúladepilin í Hovi) til at fevna um annað enn miðnámsskúlan og heilsuskúlan, men at man so eisini fær handilsskúla og tekniska skúla…"*

Sum framgongur av orðum Løgmanns, er tann triði tekniski skúlin nú við at festa røtur í Føroyum, - ella skal Tekniski Skúlin í Tórshavn flytast til Hovs? Ella skulu partar av honum flytast í nýggju hølini í Hovi? - Stýrið og leiðslan fyri Tekniska Skúlan í Tórshavn, eru enn ikki kunnaði um hesar nýggju ætlanirnar hjá Føroya Landsstýri, men hví skulu tey eisini tað?

Tó, undir øllum umstøðum, verður hetta virksemið í nýggjum hølum. So nú tykist ein "genial" loysn, enn einaferð at hómast í dagsbrúnni.

Politiski myndugleikin hevur, síðan Tekniski Skúlin í Tórshavn sá dagsins ljós í 1934, ikki megna at givið Tekniska Skúlanum í Tórshavn mansømuligar hølisumstøður. Nógvir skúlar eru bygdir, -skúlar, sum ikki vóru til, tá 2. byggistig av nýggjum Tekniskum Skúla í Tórshavn var lagt til síðis, seinast í 1970. Hetta, og so mong onnur byggiprojekt, sum vóru ætlaði at loysa hølistrupulleikarnar hjá Tekniska Skúlanum í Tórshavn, hava við jøvnum millumrúmum verið tikin úr skuffunum, og - ja, so aftur løgd í støvutu skuffurnar.

Á vári 2003 tóktist aftur at spretta. - Støvrok úr støvutu skuffunum. - Loksins tóktist eydnan blíð, tí nú var loysnin funnin - Skúladepilin við Marknagil. Ein framskygd, og eftir mínum tykki, ein framúrskarandi loysn fyri teir uml. 1000 næmingarnar, sum henda ætlanin fevndi um. Álitið var lagt fyri landsstýrið tann 28. nov. 2003.

Viðmekjast kann, at stýrini og leiðslurnar fyri teir tríggjar skúlarnar, saman við Mentamálaráðnum, mettu hetta, at vera eina sera góða loysn. Treyðugt so, onkur av starvsfólkunum hevði aðra fatan - men nær verða 250 starvsfólk fullkomiliga samd um somu loysn?

At politiski myndugleikin so tykist hoykna undir hesum "lítla" trýsti, ja tað vísir enn einaferð støðið á politisku hugsjónunum um skúlabygging og um skúlapolitikk í Føroyum. - Støvið hevur lagt seg og friður valdar aftur.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.